DAGSINS MEINING

SEV er eg – ella SEV eri ikki bara eg…

Fólkaræðið í elfelagnum SEV slapp av álvara at standa sína roynd mánadagin, tá ein fundur í umboðsnevndini viðgjørdi spurningin um gegnið hjá stjóranum, Klæmint Weihe, og hvussu stýrið í SEV hevur handfarið hetta mál, sum hevur verið frammi síðani tíðliga í vetur. Tá endaði málið við, at stýrið staðfesti, at stjórin hevði verið ógegnigur sum stjóri í SEV og nevndarformaður í P.f. Vágatunnlinum.

Eitt dømi um hetta er framferðin, tá SEV, ella stjórin í SEV, keypti eitt "neyðaggregat" til Vágatunnilin. Hesum visti stýrið ikki av, og stýrið góðtók ikki mannagongdina. Stjórin fekk tá eina átalu, og hann ásannaði, at hann hevði verið ógegnigur. Málið endaði tá við, at innanhýsis mannagongdir í SEV skuldu broytast og haraftur skuldi stjórin fara frá sum nevndarformaður í P.f. Norðoyatunnlinum og úr P.f. Vágatunnlinum, tá hesin er heilt liðugur.

Men hvørki stýrið ella stjóri virdu hesa avgerð, sum formaðurin í umboðsnevndini, Hans Tausen Olsen, virkað fyri, tí hann eftir øllum at døma var sannfordur um, at nakað var galið. Tí á fundi í stýrinum tann 17. januar lutttók stjórin aftur og eisini luttók hann í orðaskiftinum um P.f. Vágatunnilin. Eftir henda fundin kærdi ein limur í sjálvum stýrinum, Dia Poulsen, avgerðina hjá stýrinum at staðfesta eina avgerð í oktober at keypa tað nógv umrødda neyðaggregatið. Hann hevði fleiri grndgevingar fyri, at alt var ikki farið rætt fram, og hann vildi tí hava umboðsnevndina at ógilda hesa avgerð. Um umboðsnendin viðgjørdi henda spurning í gjár er í skrivandi løtu ógreitt, tí fólkaræðið í SEV røkkur ikki so langt, sum at fjølmiðlar hava atgongd til umboðsnevndarfundir, hóast vit øll, sum eru skrásett í eini føroyskari kommunu, eiga SEV.

Afturímóti samtykti umboðsnevndin at geva stjóranum eina ávaring og geva stýrinum eina átalu. Hetta er rættiliga álvarsamt. Vi mugu tí vóna, at allir partar taka sær annað skinn um bak, og virka rættvíst, ábyrgdarfult og opið.

Onkur vil halda, at formaðurin í umboðsnevndini var fyri einum tapi, tá misálit á stýrið ikki varð samtykt. Hetta er ein áskoðan. Men tað ber eisini til at siga, at tá 36 av 71 umboðsnevndarlimum samtykkja eitt misálit á stýrið, so hongur stýrið í klonum tráð og hevur at taka atfinningarnar í størsta álvara. Tað sama er galdandi fyri Klæmint Weihe, tá 58 limir í umboðsnevndini samtykkja at geva honum eina ávaring.

Sum sagt í fyrstu reglu slapp fólkaræðið í SEV at standa sína roynd mánadagin. Vit kunnu siga, at fólkaræði vann ein hálvan sigur, tí umboðsnevndin var so mikið at sær komin at hon talaði at gongdini. Tá sagt verður "hálvan sigur", so er tað tí, at umboðsnevndin er framvegis ikki meira at sær komin, enn at hon goymir seg aftan fyri stongdar dyr. Hon torir ikki at góðtaka eina fyritreytí fólkaræðinum - opinleika - og steingir fjølmiðlarnar frá at siga Føroya fólki frá orðaskifti og avgerðum í einum felagsskapi, sum vit øll eiga.

Tit umboðsnevndarlimir gloyma, at tað eru vit veljarar, sum óbeinleiðis hava valt tykkum. Tit eru okkara umboð! Ein franskur kongur var kendur fyri orðini "staturin eri eg". Tað sama kann sigast um nógvar ábyrgdarpersónar í SEV: "SEV eri eg". Men so er ikki - tit eru okkara umboð - hvørki meira ella minni. Ásannið hetta og latið dyrnar upp og virðið fólkaræðið!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Als ikki fyri sjófólk

Dan R. Petersen

Ein tann størsti varðin í løntakarasøguni er arbeiðsloysisskipanin. Tó so, ongin skipan er so góð, at hon ikki krevur ábøtur, so hvørt brekini vísa seg. Hetta mundu teir báðir tingmenninir Henrik Old og Gerhard Lognberg sanna, nú teir løgdu uppskot til broyting í løgtingslóg um ALS fyri tingið.

Tað hevur nevnliga verið so, at hóast sjómenn og reiðarar gjalda milliónir inn í grunnin, so fæst onki út aftur, um ikki maður fær sekkin. Nú hendir tað tíbetur sjáldan, at menn verða blakaðir í land. Men hóast tað so ganga sjómenn stundum arbeiðsleysir. Tað er, tá skipini fara á verft. Og hetta tekur ofta drúgva tíð. Mangan 3 og 4 mánaðir. Menn eru ikki uppsagdir, men arbeiðsplássið er "niðurlagt", teir eru arbeiðsleysir.

Uppskotið miðaði eftir, at lá skip longur enn 14 dagar vegna umvæling, skuldi manningin fá útgjald úr ALS. Í viðmerkingunum meta teir báðir tingmenninir, at miðal manningartalið er 10, og skipini, sum eru til umvælingar, er millum 5 og 10. Eg hugsi, hesi tøl eru ov lág. Miðalmanningartalið er minst 13, og skip í umvæling er minst 10. So einir 130 til 150 sjómenn eru arbeiðsleysir partar av árinum.

Tað skuldi verið upplagt, at eitt slíkt uppskot vann frama í tinginum. Men nei, samgongan og sambandsflokkurin feldu uppskotið. Sjófólk skal framhaldandi betala uttan at fáa nakað aftur.

Grundgevingin sigst vera, at ein nevnd skal endurskoða reglugerðina fyri ALS. Henda umberingin heldur ikki. Fyri tveimum árum síðani broytti løgtingið ferðslulógina eftir uppskotið frá undirritaða, bert 2 mánaðar áðrenn landsstýrismaðurin legði eina heilt nýggja ferðslulóg fyri tingið við nevndu broyting innbygdari. Tað sama átti sjálvandi at verið gjørt í hesum føri eisini. At fella hetta sjálvsagda uppskotið, við tí grundgeving at reglugerðin skal endurskoðast og møguliga eina ferð í tíðini broytast, er undanførsla.

Hvussu leingi fara manningarfeløgini og reiðarafelagið at góðtaka, at teirra limir gjalda ein skatt, sum teir onki fáa fyri?

Eg hevði nú ikki væntað tað stóra av hesi høgranationalistisku samgonguni, men at sambandsflokkurin skuldi ganga ímoti, tað skuffar meg stórliga. Sjómenn fylgja væl við, og teir hava longu noterað sær atkvøðugreiðsluna. Tað var eg biðin at heilsa sambandinum.

Viðmerkingar til Jørgen Niclasen í Dagblaðnum 17/2/2003

Lena Lastein

Føroyar eru umfataðar av UNFCCC sáttmálanum um veðurlagsbroytingar og hava sostatt skyldu at gera upp, hvussu nógv útleitt verður av veðurlagsgassi hvørt ár. Eisini hava Føroyar skyldu at fráboða og útrokna tølini sambært UNFCCC vegleiðingini. Hetta er gjørt í frágreiðingini "Útlát av veðurlagsgassi í Føroyum" har útlátini eru útroknað sambært altjóða roknihættum, sum Føroyar hava skyldu at nýta. Um Jørgen Niclasen og Fólkaflokkurin ikki ætla sær at gerða tølini upp sambært sáttmálanum eiga teir heldur at biða um fyrivarni fyri sáttmálanum enn niðurgerða eitt arbeiði teir sjávir hava játtað at taka lut í. Onnur lond gera tølini upp á sama hátt, og eiga vit eisini í Føroyum at kunna almannakunngera slík tøl.

Ein av arbeiðisseting-unum fyri verkætlanini var soljóðandi :

At gera eina fullfíggjaða uppgerð yvir útlatið av vakstarhúsgassum frá 1990-2001 og at eyðmerkja tær størstu útleiðingarnar av vakstrarhúsgassum

Frágreiðingin lýsir hagtølini, ið Føroyar hava skyldu at fráboða fyri tíðarskeiðið 1990-2001 og er ikki ætlað sum eitt tilmæli til Oljumálaráðið innan umhvørvis- ella orkumál. Frágreiðingin lýsir **støðuna** innan útlát av veðurlagsgassi í Føroyum á ymiskum hæddum.

Tað er púra burturvið at uppfata frágreiðingina sum ain ákæru og eitt álop á fiskivinnan. Sjálvandi ber ikki til at minka munandi um útlatið frá fiskiflotanum, sum er høvuðsvinnan hjá okkum, tað sigur seg sjálvt og frágreiðingingin leggjur heldur ikki upp til tað (akkurat øðvugt lýsir frágreiðingin at útlatið frá fiskiflótanum er hækkað við 4% síðani 1990, sum er ein munandi minni hækking enn fyri t.d. el-virki (47%) , ídnað (25%) og akfør (18%). Men vit sleppa ikki undan at lýsa støðuna í mun til 1990 (og ikki 1992 sum Jørgin Niclasen skipar til), tí tað er árið sum sammetast skal við, tá ið støða skal takast til Kyoto-sáttmálan. Tølini er skipað og gjørd upp eftir áheitan frá Oljumálaráðnum, at nýta til at taka støðu til Koyto-sáttmálan og er ikki eitt granskingarúrslit sum Jørgin Niclasen skipar til. Tað sum tølini greitt vísa er at vit ikki eiga ein orkupolitik í Føroyum og at orkunýtslan als ikki verður umsitin. Kyoto-sáttmála ella ikki.

Framhald á síðu 11

Avsannan

Hervið skal verða avsannað, at Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, hevur skrivað ella á nakran hátt hevur havt nakað at gera við oddagreinarnar í Sosialinum um málið viðvíkjandi landsantikvarinum soleiðis, sum Sjúrður Skaale illgitir í trimum greinum á rað í Sosialinum

Tórshavn 17. februar 2002
Jan Müller

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Blankokekkurin frá Jan Müller

Sjúrður Skaale

Hvørt ár standa einar hálvttriðjahundrað oddagreinir í Sosialinum. Har verða dagsins mál umrødd. Navngivnir persónar verða eisini umrøddir. Sum oftast sakliga. Men farnu árini hevur tónin ofta verið so harðligur og grovur, at tað hevur verið uttan fyri alt mark. Eisini injuriumarkið.

Men tann størsti trupulleikin við hesum oddagreinum er, at fólk, sum í heilum eru fyri grovum ærumeiðingum, ikki vita, hvør stendur aftanfyri. Hvør skrivar.

Í greinini verður ofta sagt "okkara hugsan er", og "vit halda". Men hvørji eru hesi "vit"? Eru tað Jan Müller og Eirikur Lindenskov? Eru tað øll tey, ið starvast á Sosialinum? Ella er tað eigari blaðsins, Føroya Javnaðarflokkur?

Tvey svar uppá hesar spurningar komu í Sosialinum í farnu viku. Eitt í eini oddagrein, og eitt frá Jan Müller.

Sambært báðum svarunum merkir "vit" bara Jan Müller. Hann hevur ikki bara tað formligu ábyrgdina sum ábyrgdarblaðstjóri, nei, hann stendur persónliga fyri hvørji einastu oddagrein. Eingin uttanfyristandandi hevur minstu ávirkan. Jan kallar tað enntá "hunddálking" og "konspiratiónsteori" at siga nakað annað enn, at Jan skrivar allar oddagreinarnar.

Hetta er nakað løgið nakað at siga. Tí tað er ikki satt. Fyri tað fyrsta er Jan í feriu nakrar vikur um árið. Viðhvørt er hann uttanlands. Onkuntíð er hann ikki til arbeiðis av øðrum orsøkum. Kortini standa hvønn einasta dag oddagreinar í blaðnum. Í hansara navni. Men hann skrivar tær ikki. Hann sær tær neyvan heldur, áðrenn tær eru prentaðar.

Og hann skrivar heldur ikki allar greinarnar sjálvur, tá hann er til arbeiðis.

Blankokekkur

Sannleikin er, at fleiri persónar skriva - men teir sleppa undan at stiga fram. Jan Müller tekur ábyrgdina fyri teir. Teir fáa ein blankokekk frá Jan, so at siga.

Hevði alt tað skrivaða verið siðiligt og sakligt, var trupulleikin ikki so stórur. Men tað er tað ikki. Stundum er tað grovt og ærumeiðandi. Tað er sannlíkt, at orsøkin nettupp er, at teir, sum skriva, sleppa undan at standa fram.

At Jan Müller letur seg brúka til hetta, er sera skaðiligt fyri tað opna kjakið. Og tað tykist heilt øvut, at tann annars so frálíki blaðstjórin ger tað. Eingin hevur nevniliga sum hann skrivað um, at hetta sama opna kjak er demokratisins hornasteinur.

Men hann letur seg brúka. Tað skrivaði eg einaferð eina grein um undir heitinum "Jan Müller leggur eitur í samfelagið". Tað var eitt sera grovt heitið, men soleiðis er tað. Hjá teimum, sum verða álopin í Sosialinum uttan at vita hvør loypur á tey, kenst tað sum eitur.

Men hetta eitur rakar eisini tey, sum skriva - ella vera hildin at skriva - oddagreinarnar. Tey koma støðugt undir mistanka. Sum oftast helst av óróttum. Men tað er ikki mín skyld. Tað er Jansa skyld.

Í farnu viku bendi sera nógv á, at Jóannes Dalsgaard hevði havt ein fingur við í spælinum í tveimum oddagreinum.

Tann illgrunan skrivaði eg um. Eg veit, at eg skar sera nær spikinum. Jan sigur leygardagin, at eg skar í spikið. At mín illgruni ikki passaði. At hann sjálvur hevði analyserað seg fram til alt tað, sum stóð í greinunum.

Alt tað, sum Jan sigur í greinini leygardagin, er ikki rætt. Men er hetta rætt, fari eg at biðja bæði Jan og Jóannes um umbering.

Men eg fari eisini at loyva mær at minna á, at tað ikki loysir trupulleikan. Hvørja ferð onkur verður álopin í oddagreinini í Sosialinum, koma nøkur fólk undir mistanka. Tí hóast Jan helst skrivar tær flestu, so vita øll, at hann ikki skrivar allar hesar greinar.

Tí átti Jan Müller at tikið blankokekkin aftur. Tað sama áttu aðrir blaðstjórar at gjørt.

Skarprættarin

Jan sigur eisini í greinini, at undirritaði, sum fyrr var bæði "fryntligur og skilagóður", nú er púra hamskiftur. Nú síggi eg meg bæði sum ein "ákæra, dómara og skarprættara", sum er "vandamikil fyri seg sjálvan og fyri demokratiið", sigur hann.

Tað rokni eg nú við, at Jan meinar sum skemt.

Sjálvur haldi eg, at Jan framvegis er líka fryntligur og skilagóður sum altíð. Blaðið hjá honum er eisini frálíkt. Eg haldi bara at hann ger eitt stórt mistak við hasi oddagreinini. Og tað er ikki sagt fyri at hunddálka Jan. Tað er sagt í bestu meining.

Framhald av síðu 10

Altjóðar frágreiðingar lýsa okkara tøl fyri hvønn íbúgvara og tað kann ikki verða rætt at vit ikki kunna bera tøluni fram á sama hátt her heima. Hvat so liggur aftanfyri at vit liggja so høgt er nakað heilt annað. Sjálvandi liggja ávis viðurskiftit aftanfyri, men tað broytir ikki at okkara útlát fyri hvønn íbúgva er so høgt í mun til onnur lond sum tað er.

Um tiltøk skulu setast í verk frá almennari síðu, verður hetta vónandi í samstarvi við vinnu- og brúkarabólkar í Føroyum. Sum frágreiðingin staðfestir, eru útlátini av veðurlagsgassi hækkað fyri fleiri bólkar í Føroym síðani 1990:

Brúkarabólkur :	Broyting í útlátinum 1990-2001	Útlátið av koltvíiltu í mun til samlaða útlátið (miðal fyri 1990-2001)
El-virki	+ 47%	14%
Ídnaður	+ 25%	15%
Akfør	+ 18%	9%
Onnur skip	+ 6%	3%
Fiskiskip	+ 4%	32%
Handlar og stovnar	+ 1%	6%
Húsarhald	- 13%	20%

Sí talvu

Skynsom umsiting av náttúrurikidøminum (vatn, jørð, luft, fiskur, o.s.fr.) er neyðug, um komandi ættarlið skulu kunna lívbjarga sær her á jørðini. Veðurlagsbroytingar kunna ikki bara koma at raka okkum her í Føroyum (streymviðurskiftini kunnu broytast og fiskastovnarnar hvørva, ongin veit), men hava longu elvt til álvarsligar truppulleikar fyri fólkasløg aðrastaðir á jørðini. Føroyar eru ein partur av heiminum, og eiga vit tí at bera okkum at samsvarandi.

Ymsar metingar um úrslitið

Tað var eitt sindur ymiskt, sum fundarluttakarar mettu um úrslitið av umboðsnevndarfundinum hjá SEV mánadagin

SEV-FUNDUR
Edvard Joensen

Tórshavn: Fleiri av umboðsnevnarlimunum hjá SEV hildu eftir fundiná Hotel Hafnia mánadagin, at stýrið í grundini hevði fingið eina dyggiliga misálitisváttan, tá tað bara akkurát hóraði undan at verða koyrt frá. Men tað helt stýrisformaðurin ikki.

Ein teirra, sum luttók á fundinum, var Klæmint Olsen úr Havn. Hann helt, at tað kundi møguliga kom har til, at leiðslan skuldi hugsa um at leggja frá sær, hóast beinleiðis meiriluti ikki var fyri tí á fundinum.

Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður í SEV, var ikki nødur við, at stýrið og stjórin vóru koyrd av fundi. Tað gjørdi, at bara annar parturin slapp at leggja síni sjónarmið fyri fundin. Kortini fekk misálitisuppskotið ikki meiriluta, og tað fegnaist stýrisformaðurin um

Mynd: Jens Kristian Vang

Klæmint Olsen helt, at leiðslan átti at skilt atkvøðugreiðlsuna soleiðis, at hon ikki situr serliga trygg ella er serliga nógv umhildin eftir alt tað, sum hent er seinastu tíðina.

Hann vísti til ta átaluna, samtykt varð at geva stjóranum fyri handfaringina av málinum um Vágatunnilin.

Men stýrisformaðurn, Poul Arni Jacobsen, var hinvegin púra ósamdur.

Hann minti á, at tað nú stóð púra greitt í gerðabókini, at ein misálitisváttan á stýrið var fallin. Sostatt var eingin ivi um, segði hann, at stýrið skuldi halda fram.

– Tað er vert at minnast til, segði Poul Arni Jacobsen, at hetta misálitisuppskotið, sum lagt varð fyri umboðsráðið, fall, hóast bara annar parturin var á fundi og kundi tosa fyri seg. Tann møguleikan fingu hvørki stýrið ella sjórin, segði Poul Arni Jacobsen, sum ikki hevði fingið at vita niðurstøðuna frá fundinum aðrastaðni enn frá pressuni, sum hevði fingið hana munnliga frá umboðsnevndarlimum og formanninum í umboðsráðnum.

Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsráðnum, helt kortini ikki, tá hann varð spurdur um tað, at hetta málið fór at fáa nakrar avleiðingar fyri hansara egna pláss sum umboðsráðsformaður, hóast tað misálitsuppskot, sum hann stóð fyri, ikki varð samtykt.